

## Finnbogi Ísakson um Ísland í 2004

**Vit endurprenta í dag grein, sum Finnbogi Ísakson, sáli, skrivaði fyri skjótt fýra árum síðani um íslendska fíggjarimperiið. Havandi í huga støðuna í Íslandi í dag er áhugavert aftur at lesa greinina.**

**Blaðstjórnin**

Nr. 240 • mikudagur • 15. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo



# Íslendska fíggjarimperiið – eitt ævintýr í kyksendi?

Mong mundu stúrsa við, tá tað herfyri frættist, at íslendingar høvdu keypt Magasin du Nord - stórhandilin, sum danir í sínari tíð vóru so ernir av at eiga. Men hetta er bara ein av teimum stóru íslendsku íløgunum í útlandinum hesi seinastu árini. Teirra virksemi røkkur víða um. Tað eru bæði bankar og handilsfyritøkur, sum breiða sítt virksemi út um landamark. Men nú er íslendska Fíggjareftirlitið farið at rópa varskó

**VINNUSÍÐUGREINING**
*Finnbogi Ísakson*



Hava vit føroyingar stúrt fyri, at útlendingar fóru at keypa okkara vinnulív, so hevur tað ikki verið íslendingar, vit hava óttast. Tað hevur heldur verið danir og kanska norðmenn.

Tað nervaði okkum heldur ikki, at Ólafur Guðmundsson hevði handilin Impo í Vágsbotni í ein mansaldur, ella at Icelandair røkti flúgvingina millum Føroyar og útheimin í nøkur ár. Tvørturímóti varð hetta at fegnast um.

Men so fóru vit so smátt at skeita skeivt til íslendingar. Vit høvdu okkara egnu farmaskipafeløg. Fleiri vóru farin á húsagang, men Skipafelagið var so eftir. So fór Eimskip at sigla upp á Føroyar, og teirra flutningur til og úr Føroyum vaks skjótt. Eisini komu íslendingar inn á handilsmarknaðin. Saman við føroyingi stovnaðu teir Bónus og keyptu seg seinni inn í SMS - størsta handil í landinum. Nú er eitt íslendskt skipafelag aftrat, Samskip, farið at sigla upp á Føroyar. Og Icelandair segði seg vera hugað at keypa ein part av Atlantsflog.

Ein morgunin vaknaðu vit við kaldan dreym: íslendingar høvdu keypt Skipafelagið - felagið, sum føroyingar í trífjórðingsøld roknaðu sum sín stoltleika á ferðamanna- og farmaskipaøkinum.

### Romantikkur

Vanliga hava fíggjarviðurskifti og pengar lítið við romantikk at gera. Men íslendingar eru tiltiknir úr gomlum tíðum at duga at siga søgur, og tað duga teir enn. Í hvussu so er duga teir at siga eina søgu um sítt egna ríkidømi, sum hevur ein farra av romantikki yvir sær. Tann søgan ljóðar soleiðis:

Björgólfur Guðmundsson var dugnaligur útróðrarmaður, men fiskiskapurin minkaði nógv síðst í 80-árunum. Hann hevði brúk fyri láni, men íslendsku bankarnir vóru trekir at veita lán tá, og umsóknin varð noktað. Eimskip var tá nógv tann størsta fyritøkan í Íslandi og hevði ræðið á øllum handilslívi av týdningi. Björgólfur setti seg upp ímóti Eimskip. Hann stovnaði farmaskipafelagið Havskip, men tí var ikki langt lív lagað.

So fekk Björgólfur eitt gott hugskot, sum eftir stuttari tíð gjørdi hann til miljardér. Fyritøka hansara gjørdist so sterk, at hon fekk ræðið á Landsbankanum, sum áður hevði verið íslendskur Tjóðbanki.

Saman við soninum Björgólfi Thor Björgólfssyni og einum vinmanni hjá soninum, Magnus Þorsteinnsson, fór hann til Russlands. Í Santa Pætursborg bygdu teir eitt lítið sodavatnsvirki, sum gjørdi mixdrinks við rúslogi í. Seinni fingu teir eina tappiavtalu við Pepsi Cola. So fóru teir at bryggja øl við navninum Bravo International, og teir seldu avbera nógv. Í 2001 gjørdu teir kvetti: hollendska bryggjaríið Heineken keypti bryggjaríið frá teimum fyri 2,8 mia.kr.

Teir tríggir - feðgarnir og vinmaðurin - fóru nú heimaftur til Íslands at gera íløgur har. Teir keyptu seg fyrst inn í Eimskip - sum hevði rent Havskip hjá Björgólfi á heysin í kappingini - og býttu felagið í fleiri deildir, so tað ikki skuldi vera einaráðandi á íslendska marknaðinum. Eisini keyptu teir 44% av partapeninginum í Landsbankanum. Bankin keypti 25% av partapeninginum í tí nýggja felagnum Burdaras, sum sonurin Björgólfur Thor Björgólfsson hevði stovnað. Hetta felagið keypti fyri kortum 10% av svenska íløgubankanum Carnegie.

17.000 aðrir íleggjarar eru í Burdaras og 13.000 aðrir eru í Landsbankanum, men tað eru feðgarnir og vinmaðurin, sum hava ræðið á báðum.

Landsbankin eigur nógv í Straumi Invest, sum nú eigur 25% av partabrøvunum í Magasin du Nord, og Straumur er eisini stórur partaeigari í Íslandsbankanum, sum er triðstørsti banki í Íslandi.

### Kaupthing í Føroyum

Í Føroyum hava vit mest hoyrt um Kaupthing, av tí at hesin bankin stovnaði í 2000 saman við Føroya Sparikassa felagið Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag Pf. Hesin fíggjarstovnur hevur givið ráð og handlað við virðisbrøvum fyri kundarnar.

Føroya Sparikassi er ikki uppi í hesi fyritøku longur. Fyri fáum døgum síðani keypti Kaupthing Bank hf. tey 49% av partapeninginum, sum Sparikassin átti, og nú eigur Kaupthing sostatt allan fíggjarstovnin. Sagt verður, at Kaupthing í Føroyum ætlar hereftir í størri mun enn higartil at bjóða føroyskum vinnulívi bankatænastur.

Samstundis keypti Sparikassin partin hjá Kaupthing í Kaupthing Bank A/S í Danmark. Sparikassin seldi síni partabrøv í Kaupthing Búnaðarbanka fyri 173 mió.kr. Vinningurin uppá partabrøvini var 132 mió.kr, harav 79 mió.kr. eru inntøkuførdar í ár, stendur á heimasíðuni hjá Sparikassanum.

Har verður eisini greitt frá, at hesin danski bankin hevði pr. 30. juni 2004 ein javna uppá 1.032 mió.kr. Yvirskotið fyrra hálvár í ár var 7,3 mió.kr. og eginognin 128 mió.kr.

Tað ljóðar alt so væl og er vónandi eisini í lagi. Persónliga kann eg ikki lata vera við at kenna eitt sindur av skriða um kroppin, tá føroyskar fyritøkur fara út í verðina at spæla stórar. Fleiri enn færri dømi eru um, at tað hevur ikki gingist so væl. Skriðin minkar ikki, tá eg hugsi um, at vit hava fyri ikki so mongum árum síðani upplivað í Føroyum, at bankar hava selt og keypt partabrøv sínámillum. Við heldur vánaligum avleiðingum.

### Altjóða Kaupthing

Virksemið, sum Kaupthing hevur í Føroyum, er bara ein evarska lítil partur av virkseminum hjá hesari fyritøku. Íslendski Kaupthing-banki varð stovnaður í 1982. Tað vóru 7 einstaklingar, teirra millum ein altingsmaður og ein professari á Háskóla Íslands, sum stovnaðu eina lítla fíggjarfyritøku við 4-5 starvsfólkum, sum keypti og seldi lánsbrøv og annað. Nøvn á stovnarunum havi eg ikki fingið, men teir eru eisini allir keyptir út síðani.

Fyritøkan fór at vaksa fyrst í 1990-árunum, og nýggj fólk komu inn. Í 2003 varð Kaupthing-bankin lagdur saman við Búnaðarbankanum, sum varð stovnaður í 1930-árunum, og tá gjørdist Kaupthing nógv tann størsti av sínum slag í Íslandi. Eftir fáum árum er Kaupthing Búnaðarbankin vorðin størsti banki í Íslandi og hevur breitt virksemi sítt til onnur lond, serliga Norðurlond, men eisini suðuri á evropeiska meginlandinum, í Bretlandi og USA. Í dag eru 20 stórir partaeigarar í Kaupthing og haraftrat nógvir smáir. Tríggir teir størstu eru: Meiður ehf (16,98 % av partapeninginum), Egla hf (10,88 %) og Arion hf.

Kaupthing hevur skrivstovur í New York, London, Danmark, Føroyum, Finnlandi, Noregi, Svøríki, Luxemburg og Sveits. Tilsamans arbeiða 1600 fólk hjá bankanum. Bankin telist millum 8 teir størstu í Norðurlondum.

Konsernsjefur í Kaupthing er Hreidar Már Sigurðsson. Hann sigur, at skuldi virksemið hjá bankanum økjast var neyðugt at fara út um landamark.

Tá árið 2002 er undantikið er BTÚ (Brutto Tjóðar Úrtøkan) í Íslandi vaksin 5% tey seinastu árini. Fiskivinnan hevur havt trupulleikar, og vøksturin kemst tí serliga av framgongd í ferðavinnuni og fíggjarvinnuni. Sambært Financial Times er marknaðarvirðið hjá Kaupthing í dag 3,1 mia. evrur, sum svarar til 23 mia.kr. í okkara peningi. Teir seinastu 18 mánaðirnar er virðið á virðisbrævamarknaðinum økt 400%. Ognirnar eru um 130 mia.kr, og yvirskotið 9 teir fyrstu mánaðirnar í 2004 var umleið 1 mia.kr. Tað er ein vøkstur uppá 130,5% sammett við sama tíðarskeið í fjør.

Í áttati- og nítiárunum liberaliseraði íslendska stjórnin so við og við fíggjarheimin, og tað skapti grundarlag fyri tí økta virkseminum hjá Kaupthing. Hreidar Már Sigurðsson sigur, at í sambandi við liberaliseringina hendi eitt ættarliðsskifti í vinnuni. Tað nýggja ættarliðið fekk sær útbúgving uttanlands, og tí hevur borið so væl til hjá Kaupthing at víðka virksemi víða um lond.

Nevndarformaður í Kaupthing bankanum er Sigurður Einarsson. Hann ferðast 200 dagar um árið, og fyri at hava tað lættari at røkka norðurlendskar og evropeiskar høvuðsstaðir, flutti hann herfyri til London at búgva. Hann roknar við at vera nógv færri dagar burturstaddur nú.

Pápin var sendiharri í Danmark, og tí var lagamanni hjá Sigurði at lesa til cand. polit. á universitetinum í Keypmannahavn. Hann hevði framíhjástarv í Den Danske Bank, meðan hann las, og tá hann var liðugur, fekk hann fulltrúastarv har.

Eftir 9 árum vendi hann heimaftur, fekk starv í einum lítlum banka fyrst og